ALMANNAMÁLARÁÐIÐ
MINISTRY OF SOCIAL AFFAIRS

9. november 2020
Mál: 20/00733-24
Tygara skriv:
Viðgjørt: HP

Viðv. spurningum frá Trivnaðarnevndini til landsstýrismannin í almannamálum í sambandi við løgtingsmál 31/2020

1. *Kann landsstýrismaðurin vísa á við nøkrum dømum, hvussu fólk í tillagaðum starvi, sum skifta starv, verða ávirkað lønarliga. Gott um hetta kann lýsast í dømum fyri ymiskar lønarbólkar.*

Svar:
Lønin hjá persónum í tillagaðum starvi verður ikki ávirkað av broytingum. Broytingin ávirkar lønarískoytið, sum er ein veiting frá landinum. Veitingin verður latin fyri mistan arbeiðsførleika og ikki fyri útint arbeiði, sum er tann parturin, sum arbeiðsgevarin rindar. Hetta kann samanberast við ein fyritíðarpensjonist, ið arbeiðir. Pensjónin er líka fyri øll men verður mótroknað í mun til lønarinntøkuna. Tað er onki samband millum pensjón og sáttmálaløn ella í mun til inntøku higartil.

Niðanfyri eru dømi um, hvussu lønarískoyti til persónar í tillagaðum starvi í ymiskum lønarbólkum verður ávirkað.

Sáttmálaløn **21.041 kr.**

	Verandi 2020			Verandi 2021			Nýggj mál 2021		
Arbeiðs føri	løn frá arbeiðsg.	Lønar-ískoyti	Inntøka tils	løn frá arbeiðsg.	Lønar-ískoyti	Inntøka tils	løn frá arbeiðsg.	Lønar-ískoyti	Inntøka tils
10%	2.104	18.937	21.041	2.104	18.937	21.041	2.104	18.552	20.656
33%	7.014	14.027	21.041	7.014	14.027	21.041	7.014	14.027	21.041
50%	10.521	10.521	21.041	10.521	10.521	21.041	10.521	10.521	21.041
66%	14.027	7.014	21.041	14.027	7.014	21.041	14.027	7.014	21.041

Viðm.: upphæddin á 21.041 svarar til byrjunarløn sbrt. sáttmála hjá S&K

Sáttmálaløn **25.000 kr.**

	Verandi 2020			Verandi 2021			Nýggj mál 2021		
Arbeiðs føri	løn frá arbeiðsg.	Lønar-ískoyti	Inntøka tils	løn frá arbeiðsg.	Lønar-ískoyti	Inntøka tils	løn frá arbeiðsg.	Lønar-ískoyti	Inntøka tils
10%	2.500	22.000	24.500	2.500	19.900	22.400	2.500	18.352	20.852
33%	8.333	16.667	25.000	8.333	16.667	25.000	8.333	16.019	24.352
50%	12.500	12.500	25.000	12.500	12.500	25.000	12.500	12.500	25.000
66%	16.667	8.333	25.000	16.667	8.333	25.000	16.667	8.333	25.000

Sáttmálaløn **30.000 kr.**

	Verandi 2020			Verandi 2021			Nýggj mál 2021		
Arbeiðs føri	løn frá arbeiðsg.	Lønar-ískoyti	Inntøka tils	løn frá arbeiðsg.	Lønar-ískoyti	Inntøka tils	løn frá arbeiðsg.	Lønar-ískoyti	Inntøka tils
10%	3.000	22.000	25.000	3.000	19.900	22.900	3.000	18.152	21.152
33%	10.000	20.000	30.000	10.000	19.900	29.900	10.000	15.352	25.352
50%	15.000	15.000	30.000	15.000	15.000	30.000	15.000	13.352	28.352
66%	20.000	10.000	30.000	20.000	10.000	30.000	20.000	10.000	30.000

Sáttmálaløn **35.000 kr.**

	Verandi 2020			Verandi 2021			Nýggj mál 2021		
Arbeiðs føri	løn frá arbeiðsg.	Lønar-ískoyti	Inntøka tils	løn frá arbeiðsg.	Lønar-ískoyti	Inntøka tils	løn frá arbeiðsg.	Lønar-ískoyti	Inntøka tils
10%	3.500	22.000	25.500	3.500	19.900	23.400	3.500	17.952	21.452
33%	11.667	22.000	33.667	11.667	19.900	31.567	11.667	14.685	26.352
50%	17.500	17.500	35.000	17.500	17.500	35.000	17.500	12.352	29.852
66%	23.333	11.667	35.000	23.333	11.667	35.000	23.333	10.019	33.352

Sáttmálaløn **40.000 kr.**

	Verandi 2020			Verandi 2021			Nýggj mál 2021		
Arbeiðs føri	løn frá arbeiðsg.	Lønar-ískoyti	Inntøka tils	løn frá arbeiðsg.	Lønar-ískoyti	Inntøka tils	løn frá arbeiðsg.	Lønar-ískoyti	Inntøka tils
10%	4.000	22.000	26.000	4.000	19.900	23.900	4.000	17.752	21.752
33%	13.333	22.000	35.333	13.333	19.900	33.233	13.333	14.019	27.352
50%	20.000	20.000	40.000	20.000	19.900	39.900	20.000	11.352	31.352
66%	26.667	13.333	40.000	26.667	13.333	40.000	26.667	8.685	35.352

Sáttmálaløn **45.000 kr.**

	Verandi 2020			Verandi 2021			Nýggj mál 2021		
Arbeiðs føri	løn frá arbeiðsg.	Lønar-ískoyti	Inntøka tils	løn frá arbeiðsg.	Lønar-ískoyti	Inntøka tils	løn frá arbeiðsg.	Lønar-ískoyti	Inntøka tils
10%	4.500	22.000	26.500	4.500	19.900	24.400	4.500	17.552	22.052
33%	15.000	22.000	37.000	15.000	19.900	34.900	15.000	13.352	28.352
50%	22.500	22.000	44.500	22.500	19.900	42.400	22.500	10.352	32.852
66%	30.000	15.000	45.000	30.000	15.000	45.000	30.000	7.352	37.352

Sáttmálaløn **50.000 kr.**

	Verandi 2020			Verandi 2021			Nýggj mál 2021		
Arbeiðs føri	løn frá arbeiðsg.	Lønar-ískoyti	Inntøka tils	løn frá arbeiðsg.	Lønar-ískoyti	Inntøka tils	løn frá arbeiðsg.	Lønar-ískoyti	Inntøka tils
10%	5.000	22.000	27.000	5.000	19.900	24.900	5.000	17.352	22.352
33%	16.667	22.000	38.667	16.667	19.900	36.567	16.667	12.685	29.352
50%	25.000	22.000	47.000	25.000	19.900	44.900	25.000	9.352	34.352
66%	33.333	16.667	50.000	33.333	16.667	50.000	33.333	6.019	39.352

2. *Er tað rætt skilt, at broytingin fyri fólk, sum eru í skipanini nú er, at hægsta lønarískoyti lækkar við 2.100 kr. um mánaðin?*

   Svar:
   Ja

3. *Landsstýrismaðurin hevur víst á, at ongin í tillagaðum starvi skal koma undir eina arbeiðaraløn (undantikið niðursetta tíð). Somuleiðis hevur landsstýrismaðurin í Løgtinginum upplýst, at ongin í verandi skipan kemur undir eina arbeiðaraløn, men at nýggj fólk, sum koma í skipanina, kunnu fara niður um arbeiðaralønina. Í lógaruppskotinum stendur í viðmerkingunum um nýskipanina við uppskotinum, at persónar í tillagaðum starvi eru tryggjað í minsta lagi eina fulla arbeiðaraløn. Her virkar ikki, sum samsvar er millum tað, sum er sagt, og tað sum stendur. Kann landsstýrismaðurin upplýsa, um øll í verandi skipan fáa eina arbeiðaraløn? Og um øll nýggj eisini fáa eina arbeiðaraløn?*
   Hyggja vit eftir skrivum til nevndina, so sær tað út til, at fólk fara niður um arbeiðaralønina í nýggju skipanini. Serliga har arbeiðsførleikin er lágur. Hvørjar viðmerkingar hevur landsstýrismaðurin til hetta?

   Svar:
   Ein setningur í almennu viðmerkingunum er komin skeivt fyri. Tað stendur í skeivum stað, at persónur í tillagaðum starvi er tryggjaður eina arbeiðsmannaløn. Tað er bara galdandi fyri verandi tillagað størv. Í sambandi við nýggj tillagað størv er tað, sum eisini stendur í uppskotinum, galdandi, at tá løn frá arbeiðsgevara er 2.000 kr. um mánaðin, tá er lønarískoytið 18.552 kr. Tað merkir, at persónur í tillagaðum starvi er tryggjaður inntøku á 20.552 kr. Ein arbeiðsmannaløn fyri fyri 40 tíma arbeiðsviku er knappliga 21.900 kr.

   Landsstýriskvinnan hevur undir viðgerðini í Løgtinginum, í tíðindaskrivum o.ø. lagt áherðslu á, at ongin í verandi skipan, fer at hava inntøku lægri enn ein arbeiðsmannaløn (undantikið tey, sum vanliga hava arbeitt niðursetta tíð).

4. *Hvørjar viðmerkingar hevur landsstýrismaðurin til skrivið frá Fakfelagsráðnum? Serliga verður hugsað um tað, sum Fakfelagsráðið vísir á um, at fólk fara frá sáttmálaløn, og at tað serliga fer at raka tey, sum hava minstan arbeiðsførleika.*

   Svar:
   Fakfelagsráðið, eins og aðrir hoyringspartar, skriva, at persónar í tillagaðum starvi frameftir ikki fara at fáa sáttmálaløn fyri sítt arbeiði. Landsstýriskvinnan tekur ikki undir við hesum. Øll í tillagaðum starvi – bæði í dag og frameftir – fara at fáa sáttmálaløn fyri sítt arbeiði. Lønarískoytið, sum landið veitir aftrat lønini, er ein almannaveiting, tí persónurin hevur niðursettan arbeiðsførleika og skal ikki samanberast við løn.

   Fakfelagsráðið hevur valt at vísa á dømi, har inntøkan lækkar, tá persónur fer frá arbeiði til tillagað starv. Landsstýriskvinnan hevur ongar viðmerkingar til dømini (tó at Almannamálaráðið í dømi 3 kemur fram til eina aðra upphædd enn Fakfelagsráðið. Talan er tó um smávegis upphædd, sum ikki ávirkar heildarmyndina).

Tað er, sum dømini vísa, at tað eru tey við lægsta arbeiðsførleikanum, og tey við hægstu sáttmálaløgnunum, sum frameftir fara mest niður í inntøku, tá tey fara frá arbeiði til tillagað starv. Men landsstýriskvinnan skal eisini viðmerkja, at hjá meginpartinum av teimum, sum frameftir koma í tillagað starv, verður løn og lønaríkoyti tilsamans svarandi til sáttmálaløn.

5. *Hvørjar viðmerkingar hevur landsstýrismaðurin til skrivið, nevndin hevur fingið frá Michael Feldballe?*

Svar:
Skrivið frá Michael Feldballe (MF) er ikki nýggj vitan fyri landsstýriskvinnuna og Almannamálaráðið. MF vísir tó á fleiri dømi, enn landsstýriskvinnan hevur við í lógaruppskotinum.

MF hevur sett arbeiðsmannaløgnina hægri enn tað, sum Almannamálaráðið vanliga brúkar og hevur brúkt í sambandi við hetta løgtingsmálið. Tá MF hevur eina hægri arbeiðsmannaløn í sínum dømum, tá verða niðurstøðurnar gjøgnumgangandi í skrivinum ikki tær somu, sum Almannamálaráðið kemur fram til.

MF hevur sett sáttmálaløn hjá einum arbeiðsmanni til 23.200 kr., sum svarar til fastlønarsáttmálan millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag. Havandi í huga, at flestu arbeiðsfólk, sum fáa løn sambært sáttmálanum, eru tímalønt, hevur landsstýriskvinnan brúkt lønina hjá tímaløntum. Ein tímaløntur arbeiðsmaður hevur í miðal eina inntøku á 21.894 kr. um mánaðin.

MF vísir á, at inntøkan hjá teimum, sum hava lítlan arbeiðsførleika, verður minni í nýggju skipanini enn samsvarandi inntøka hjá einum fyritíðarpensjonisti, sum arbeiðir. MF vísir sostatt á, at fleiri kunnu fara at fáa fyritíðarpensjón heldur enn lønaríkoyti. Til hetta er at siga, at fyritíðarpensjón er ikki nakað, sum kann veljast til ella frá. Fyritíðarpensjón verður ikki veitt fyrr enn viðkomandi er mettur í mun til aðrar fyriskipanir – serliga eftir løgtingslóg um arbeiðsfremjandi tiltøk. Landsstýriskvinnan væntar sostatt ikki, at fleiri fara at fáa fyritíðarpensjón orsakað av broytingini.

6. *Metir landsstýrismaðurin tað vera í samsvari við ST-sáttmálan um rættindi hjá fólki, sum bera brek, at løgnin lækkar, og at tann parturin, landið kompenserar fyri í lønaríkoyti, ikki longur verður sambært sáttmála við avvarðandi fakfelag - alt eftir hvør útbúgvingin og starvsheitið er? Og metir landsstýrismaðurin, at ætlaða lógarbroytingin er í samsvari við aðalmálini í ST-sáttmálanum um, at londini m.a. virka fyri javnseting av borgarum, og burturbeining av øllum mismuni millum fólk vegna brek*?

Svar:
Í spurninginum verður sipað til, at løgnin lækkar. Løgnin lækkar ikki. Hon verður framhaldandi sambært galdandi sáttmála. Tað er lønaríkoytið, sum er ein almannaveiting, sum lækkar. Veitingin verður latin fyri mistan arbeiðsførleika og ikki fyri útint arbeiði, sum er tann parturin, sum arbeiðsgevarin rindar.

At skipanin við tillagaðum støvum verður broytt er ikki í andsøgn við ST-sáttmálan um rættindi hjá fólki, sum bera brek. Grein 27 í ST-sáttmálanum, sum viðvíkur

arbeiðsmarknaðinum, hevur ásetingar um rættin at arbeiða á jøvnum føti við onnur, at banna mismuni, at tryggja møguleikan at gagnnýta arbeiðsrættindi, at taka burtur forðingar o.s.fr.

Um ein støða hevði tikið seg upp, at ein persónur, ið ber brek, ikki hevði fingið sáttmálaløn fyri sítt arbeiðsavrik, so hevði tað verið brot á sáttmálan. Men tað er ikki tað, sum løgtingsmál nr. 31/2020 snýr seg um. Talan er um, hvussu eitt lønarískoyti, sum er almannaveiting, og sum kemur umframt lønina, skal setast saman.

Grein 27 í ST-sáttmálanum hevur ongar ásetingar um samsýningar, lønarískoyti o.a., sum kemur aftrat lønini frá arbeiðsgevara. Fyritíðarpensjonistur, sum arbeiðir, er í eini líknandi støðu, og er heldur ikki tryggjaður inntøku svarandi til sáttmálaløn.

Onki land, sum vit vita um, hevur eina skipan við tillagaðum størvum, sum líkist tí, sum er galdandi í Føroyum í dag. Eisini eftir at skipanin er broytt, fara vit í Føroyum at hava eina skipan, sum fyri borgaran verður betri enn í okkara grannlondum.

7. *Føroya Arbeiðsgevarafelag vísir á, at lønarparturin hjá arbeiðsgevara er eftir sáttmála, og at man nú vil broyta skipanina soleiðis, at lønarískoytisparturin hjá landinum ikki verður eftir sáttmála, og at hetta er óheppið. Hvørjar viðmerkingar hevur landsstýrismaðurin til hetta*?

Svar:
Føroya Arbeiðsgevarafelag skrivar, at

"*Ein grundregla á arbeiðsmarknaðinum er, at løntakarin fær løn eftir tí sáttmála, sum hann er fevndur av. Hetta er knýtt at arbeiðinum, sum løntakarin fremur. Tað er undrunarsamt, at hetta ikki skal verða galdandi fyri útgjaldspartin hjá Almannaverkinum í mun til tey, sum hava skerdan arbeiðsførleika.*"

Sum nevnt finnast tað ikki í øðrum londum varandi skipanir, har tað almenna veitir lønarískoyti upp til sáttmálaløn, og skipanin í Føroyum hevur einans verið galdandi síðani 2018. Tí verður ikki mett, at talan er um eina grundreglu – hvørki í Føroyum ella í øðrum londum. Hinvegin er tað ein grundregla, at ein løntakari fær sáttmálaløn fyri tað arbeiði, sum hann fremur. Tað er galdandi í dag, og tað verður galdandi frameftir.

Eisini skrivar Føroya Arbeiðsgevarafelag, at

"*Lóggáva sum henda eigur at endurskoðast og tillagast við millumbilum fyri at tryggja, at lóggávan ikki gongur ímóti vanligum arbeiðsmarknaðarpolitiskum endamálum, so sum at tað skal loysa seg at arbeiða og hjá fólkið at taka útbúgving o.l.*"

Skipanin, sum skotin verður upp at seta í gildi, er soleiðis sett saman, at tess hægri lønin er, tess hægri er samlaða inntøkan. T.v.s., at tað loysir seg at avrika eyka, tað loysir seg at arbeiða meira og tað er ein fyrimunur at hava útbúgving, tí samlaða inntøkan verður hægri. Hinvegin er verandi skipan soleiðis sett saman, at tá persónur í tillagaðum starvi arbeiðir meira, tá rindar landið minni, og samlaða inntøkan verður óbroytt. Og øvugt tá arbeitt verður minni, tá rindar landið meira, og inntøkan verður sostatt óbroytt.

Føroya Arbeiðsgevarafelag førir fram, at skipanin skal eggja fólki í tillagaðum starvi at átaka sær meirútbúgving. Til hetta er at siga, at tillagað starv eigur einans at játtast, tá allir endurbúgvingarmøguleikar eru troyttir.

Eisini vísir Føroya Arbeiðsgevarafelag á, at almenni- og privati arbeiðsmarknaðurin ikki eru javnsettir, tí privatir arbeiðsgevarar ikki hava somu møguleikar at veita viðbøtur (hetta tí viðbøtur í nógvum førum eru partur av almennu lønarsáttmálunum). Hetta lógaruppskotið broytir ikki hesi viðurskifti.

8. *Metir landsstýrismaðurin tað verða rætt, at fólk við skerdum førleika ikki longur fáa sáttmálaløn og løn eftir útbúgving*?

Svar:
Fólk við skerdum førleika fara framhaldandi at fáa sáttmálaløn og løn eftir útbúgving fyri sítt arbeiðsavrik.. Lønaríkoyti verður tó ikki veitt á sama hátt. Lønaríkoyti verður ikki veitt eftir sáttmálaløninni, men verður veitt eftir, hvussu høg arbeiðsløn er. Í verandi skipan er tað soleiðis, at persónur við høgari løn fær hægri almannaveiting enn persónur við lágari. Frameftir verður tað øvugt, soleiðis at persónur við lágari løn fær hægri lønaríkoyti enn persónur við høgari løn. Yvirskipað metir landsstýriskvinnan tað vera rætt, at tey, sum hava størstan tørv, skulu hava hægstu almannaveitingarnar.

9. *Vit kunnu taka dømi við einum lærara, sum er í skipanini í dag, og einum lærara, sum kemur inn eftir nýggju skipanini. Hvussu verður munurin millum hesar starvsfelagar í krónum og oyrum? Vit kunnu siga við støði í t.d 30% og 50% arbeiðsførleika á sama arbeiðsplássi? Sama dømi við øðrum fakbólkum hevði eisini verið gott hjá nevndini at fingið. T.d fyri fólk á fiskavirki, fyri fólk í Starvsmannafelagnum, Heilsuhjálparafelagnum o.ø.*

Svar:
Talvurnar niðanfyri vísa dømi um fakbólkar, sum eru í tillagaðum starvi í ávikavist verandi skipan og skipanini, sum ætlanin er at seta í gildi frameftir.

Lærari á endaløn – 35.638 kr.

	Verandi skipan			Nýggj skipan		
	Arb. løn	Ískoyti	Tils.	Arb. løn	Ískoyti	Tils.
Arb.føri 30%	10.692	22.000	32.639	10.692	15.075	25.767
Arb.føri 50%	17.819	17.819	35.638	17.819	12.224	30.044

Starvsmannafelagið á 15. lønarstigi – 29.290 kr.

	Verandi skipan			Nýggj skipan		
	Arb. løn	Ískoyti	Tils.	Arb. løn	Ískoyti	Tils.
Arb.føri 30%	8.787	20.503	29.290	8.787	15.837	24.624
Arb.føri 50%	14.645	14.645	29.290	14.645	13.494	28.139

Heilsuhjálpari á 10. lønarstigi – 26.050 kr.

	Verandi skipan			Nýggj skipan		
	Arb. løn	Ískoyti	Tils.	Arb. løn	Ískoyti	Tils.
Arb.føri 30%	7.815	18.235	26.050	7.815	16.226	24.041
Arb.føri 50%	13.025	13.025	26.050	13.025	13.025	26.050

Tímalønt arbeiðsfólk – Grundløn sbrt. Føroya arbeiðarafelag – 21.894 kr.

	Verandi skipan			Nýggj skipan		
	Arb. løn	Ískoyti	Tils.	Arb. løn	Ískoyti	Tils.
Arb.føri 30%	6.568	15.326	21.894	6.568	15.326	21.894
Arb.føri 50%	10.947	10.947	21.894	10.947	10.947	21.894

10. *Um uppskotið verður samtykt, fara vit so at uppliva, at fólk fara at fáa ymiska løn fyri sama arbeiði? T.d. tvey fólk við sama skerda arbeiðsførleika fáa ymiska løn fyri sama arbeiði?*

Svar:
Persónar í nýggju og gomlu skipanini fara at fáa somu løn. Lønarískoytið kann tó vera ymiskt, um ískoytið verður veitt eftir ymiskum skipanum.

Almannamálaráðið 9. november 2020

Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur
landsstýriskvinna